# Námsfrøðingar til Barnalund í Fuglafirði

**Søkt verður eftir:**

- 1 námsfrøðingi á 40 tímar um vikuna á barnagarsstovu at byrja 1. mars 2020.
- 1 námsfrøðingi á 35 tímar um vikuna í vøggustovu at byrja 1. mars.2020.

**Hvørji eru vit:**

- Barnalund, er ein samansjóðaður dagstovnur ætlaður 60 børnum í aldrinum 0-6 ár. Stovnurin er skipaður í tvey hús,- við einari vøggustovu og einari barnagarðstovu í hvørjum húsi. Ein felagsgongd/-høll, við fjølbroyttum virksemismøguleikum, bindur húsini saman. Uttanumøkið hjá stovninum er stórt og endurspeglar í stóran mun uppruna lendið og bjóðar inn til ymiskar avbjóðingar.

**Vit sóknast eftir starvsfólki:**

- ið hevur umsorgan fyri børnunum.
- ið bæði kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi.
- ið er týðilig í samskifti og leggur dent á gott samstarv.
- ið hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum.
- ið er eldhuga og konstruktivt.
- ið sær møguleikar fram um mørk.

**Vit kunnu bjóða tær:**

- Áhugavert og avbjóðandi starv
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur.
- eitt starv, har tú kanst nýta tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan.
- sernámsfrøðiliga ráðgeving.
- tegn til talu.

**Setanartreytir:**

Løn eftir sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um námsfrøðingar ikki søkja størvini, kann hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

Nærri fæst at vita um stovnin og um størvini við at venda sær til leiðaran í Barnalund
Leilu H. Hansen á tlf. 238031.

Umsókn saman við prógvi og møguligum viðmæli/-um, skal sendast til býráðsskrivstovuna: Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo, í seinasta lagi mánadagin 27. januar 2020 kl. 12.00.


**Fuglafjarðar kommuna**

**Ennivegur 38, 530 Fuglafjørður**

**info@fuglafjordur.fo**